

# HETTA LÍVIÐ DÁ

**ÚTOYGGJ** - Tað er sjálvandi ilt at siga við vissu. Men um eg ikki hevði havt nóg mikið at takast við hvønn einasta dag, so veit eg ikki rættiliga um eg framvegis hevði búð herúti, sigur 59 ára gamli Eyðun Jacobsen, fyrrverandi borgarstjóri í Svínoy, og sum nú virkar sum "alt-mulig-mand" hjá Klaksvíkar kommunu í heimbygdini. - Sum støðan er nú, havi eg ivaleyst at gera.

Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

Svínoy: Tað er ein vanligur mikudagur í januar mánaði. Klokkan er farin av hálvgum tíggju, og Eyðun ger seg kláran til enn eina uppgávu.

Um eina lítla løtu kemur Alfa Pilot á víkina, og við sær hevur hann postin og onkrar pakkar sum Eyðun skal fáa út til røttu viðkomandi.

Hetta er bert ein av mongum uppgávum hjá Eyðuni í heimbygdini. Hesa uppgávuna fremur hann eisini við nærlagni og trúfesti. Tað ræður um at fáa postin út sum skjótast, áðrenn næsta uppgávan stendur fyri framman.

- Ja, teir hava beint nú ringt um tyrluna. Hon skal koma her um hálvgumtey-tíðina - rættari sagt klokkan 13:28 úr Klaksvík. Men tað er ikki vist, at nakað ferðafólk er til okkum. Um so er, fer hon beinleiðis til Fugloynna.

- Tað var okkurt við einum útlendskum myndamanni sum møguliga skuldi til Svínoyar, men tað vita teir ikki enn. Tað finna vit nokk útav, sigur Eyðun Jacobsen. - Vit fara at tosa saman beint eftir døgurða.

Eyðun hevur longu tikið postin inn á lítla posthúsið, og ger klárt til tvær av dagsins uppgávum: At bera postin út, og í øðrum lagi at rigga til at lata posthúsið upp klokkan 3.

- Vit hava opið tríggjar dagar um vikuna - mánadag, mikudag og fríggjadag frá klokkan 3 til 4. Hóast vit ikki eru so mong herúti, so gjalda tey flestu sínar rokningar her á posthúsinum.

- Tað eru ikki øll sum hava teldu, og kunnu tí ikki avgreiða øll síni ørindi uppá tann mátan. Tí hevði tað verið nokkso keðiligt um einki posthús var herúti, slær Eyðun fast.

Eingin ivi er um, at Svínoyggin hevur upplivað bæði uppgangstíðir og niðurgangstíðir. Nú verður í spenningi sæð fram ímóti at smoltstøðin aftur fer at virka.

## Útoyggj

Tá Eyðun lítur aftur um bak og minnist aftur á farnar barnadagar, stendur eitt sólarklárt:

Fyri eini fimmti árum síðani ella har á leið, búðu oman fyri 200 fólk í Svínoy. Tá var lív, menning og trivnaður í oynni, sum mong nú meta sum eina útoyggj. Í dag er bert ein tíggjundapartur eftir í bygdini.

Hesa gongdina hevur ein somuleiðis sæð í øðrum bygdum og útoyggjum, men tað var kortini ein týdningarmikil munur: Svínoy minkað í skjótara lagi.

- Tað sigur seg sjálvt, at tá eingi ungfólk vilja flyta út higar at búgva, og tey gomlu fara, so kann tað bara ganga ein veg.

- Og tað sært tú eisini aftur í fólkatalinum í dag, harmast Eyðun. Í dag eru 40 fólk skrásett her, og er tað minsta tal av fólki seinastu 25 árini.

Afturgongdin í fólkatalinum byrjaði av álvara í árunum beint eftir seinna heimsbardaga.

## Broytingar

Sjálvur minnist Eyðun ikki nakað serliga til hesa tíðina eftir heimsbardagan, men tá hann vaks upp í 50'unum og 60'unum var væl av fólki í oynni.

- Hetta var ein serstøk tíð, tí bæði mynstrið við arbeiði og búseting broyttust rættiliga nógv í Føroyum, vísir hann á.

Millum broytingarnar vóru tær, ið hendu innan fiskiflotan og fiskiskapin, nú skipsmenn vóru longur burturi og styttri tíð heima. Fleiri familjur tóku tí fylgjurnar av hesum, og valdu at búseta seg í Klaksvík.

Í 60'unum øktust somuleiðis møguleikarnir hjá fólki at nema sær víðari útbúgvingar, millum annað í Hoydølum, har ein bæði kundi ganga í realskúla og studentaskúla.

At ungir og lestrarhugaðir svínoyingar eisini vildu taka við hesum tilboðnum í høvuðsstaðnum, var einki at siga til. Hetta førdi aftur við sær, at fleiri familjur búsettust í Havn, har børnini gingu í skúla.

- Soleiðis hevur tað verið allatíðina. Tann sum fyrst hevur fingið sær eina útbúgving, hevur ikki so nógvar møguleikar at gera brúk av henni herúti, staðfestir Eyðun. - Hetta er bara veruleiki.

## Tí búgvi eg her

Hinvegin kann ein eisini venda spurninginum á høvdið, og spyrja Eyðun, hví hann altso býr herúti í dag. Og framvegis ætlar tað.

Í hansara føri er støðan hon, at konan hevur vaktararbeiði aðrastaðni og dótturin, Sólvá býr framvegis í heimbygdini. Og honum eru litin fleiri álitisstørv til, millum annað við posti, tyrluflúgving og kommunu.

- Tja, eg veit ikki rættiliga. Eg eri uppvaksin her og mær hevur altíð dámað sera væl her í bygdini, sigur Eyðun.

Og hann leggur aftrat:

- Eg havi ikki altíð gingið herúti. Eg havi siglt úti í nógv ár, og havi sæð verðina alla sum hon var.

- Men mær hevur kortini altíð dámað væl at koma aftur higar. Og eg havi so altíð havt nokk at takast við hvønn einasta dag. Tí eri eg framvegis her.

snorri@sosialurin.fo